Fíggjarmálaráðið

Løgtingið

Dagfesting: 22. september 2020
Mál nr.: 20/00342
Málsviðgjørt: JEK
Eftirkannað: 14. september 2020

Uppskot til løgtingslóg um tíðaravmarkað avgjald á ferðandi við komu til Føroya

Uppskot til

Løgtingslóg
um
tíðaravmarkað avgjald á ferðandi við komu til Føroya

§ 1. Áðrenn ella við komu til Føroya skulu ferðandi, sum eru 12 ár ella eldri, rinda eitt avgjald á kr. 312,00. Avgjaldið er frítikið fyri meirvirðisgjald. Heimilað er flutningsfyritøkunum ella umboðum teirra at krevja eitt ómaksgjald fyri ómakin.

§ 2. Avgjaldið verður kravt inn av flutningsfyritøkunum ella umboðum teirra. Um ferðaseðilin er seldur, tá henda løgtingslóg kemur í gildi, setir flutningsfyritøkan seg í samband við tann ferðandi til tess at tryggja, at avgjald verður rindað áðrenn ella við komu til Føroyar.
Stk. 2. Avgjald, ið er innkravt í einum mánaði, skal verða goldið í seinasta lagi 22. í øðrum mánaðinum eftir. Flutningsfyritøkan skal í seinasta lagi 10. í øðrum mánaðinum eftir senda TAKS uppgerð yvir innkravt avgjald avvarðandi mánað.
Stk. 3. Er avgjaldið ikki goldið, tá freistin er úti, skulu 0,7% roknast í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum at rokna. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu.
Stk. 4. Avgjald og renta, ið eru fallin til gjaldingar, kunnu verða innheintað við panting. TAKS fremur panting fyri avgjøld og rentur, ið eru fallin til gjaldingar eftir hesi løgtingslóg.

§ 3. Er avgjald ikki rindað við komu til Føroyar, krevur TAKS avgjaldið inn.

§ 4. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. oktober 2020 og fer úr gildi 1. januar 2021.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Við uppskotinum verður álagt eitt avgjald á kr. 312,00 fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober 2020 til og við 31. desember 2020. Uppskotið er grundað á øktu útreiðslurnar til COVID-19-kanningar.

1.2. Galdandi lóggáva
Talan er um eitt nýtt avgjald.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Í § 1 í fyriskipan nr. 655 frá 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme (epidemilógin) er ásett, at við tí endamáli at forða fyri, at ávísar smittusjúkur o.t. verða breiddar út í Føroyum og verða bornar til og frá Føroyum, kann Farsóttarnevndin seta ávís tiltøk í verk. Koronuvirus (COVID-19) er sett á B-listan í epidemilógini, sum ein smittandi sjúka, sbrt. bekendtgørelse for Færøerne nr. 180 af 5. marts 2020.

Farsóttin varð staðfest í Føroyum í mars mánaði 2020 og í hesum sambandi vórðu ymsar fyriskipanir settar í verk, eins og fólk vórðu sett í sóttarhald. Farsóttarnevndin hevur álagt øllum, sum koma til Føroya, at lata seg kanna fyri COVID-19. Øll ferðandi til Føroya eru tí síðani 27. juni 2020 kannað fyri COVID-19. Kanningarnar eru ókeypis fyri ferðandi. Metingin er, at tað koma 3.000 ferðandi um vikuna í september, men talið av ferðandi minkar helst, sum árið líður.

Kanningarnar eru ein týðandi partur hjá Føroyum at verja seg ímóti koronufarsóttini, samstundis sum føroyingar framhaldandi kunnu hava ein vanligan gerandisdag.

Roknað verður við, at kanningarnar mugu halda áfram eina tíð afturat. Við hesum uppskoti verður kravt eitt avgjald við komu til Føroya.

Avgjaldð er grundað á øktu útreiðslurnar til COVID-19-kanningar.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verður álagt eitt tíðaravmarkað avgjald við komu til Føroya.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Grundað á serstøku støðuna landið er í, hava stundir ikki verið til at senda uppskotið til hoyringar við vanligari hoyringsfreist.

Uppskotið hevur tó verið til hoyringar hjá flutningsfeløgunum, men við sera stuttari hoyringsfreist.

Undir viðgerðini av málinum hevur Fíggjarmálaráðið havt fund við umboð fyri flutningsfyritøkurnar, eins og Fíggjarmálaráðið hevur samskift við TAKS um málið.

Fíggjarmálaráðið hevur fingið hoyringsvar frá Atlantic Airways og SAS.

Atlantic Airways leggur í hoyringssvari sínum upp til ávísar broytingar.
Fíggjarmálaráðið hevur tikið broytingaruppskotini til sín og hevur broytt uppskotið samsvarandi.

Atlantic Airways væntar, at uppskotið kann hava við sær, at ferðafólkatalið til Føroyar fer at minka.

SAS vísir í hoyringssvari sínum á, at felagið at rokna frá 1. oktober 2020 fyribils hevur valt ikki at flúgva til og úr Føroyum.

Fíggjarmálaráðið harmast um avgerðina, men tekur avgerðina hjá felagnum til eftirtektar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Við uppskotinum verður álagt eitt avgjald á kr. 312,00 fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober 2020 til og við 31. desember 2020. Uppskotið avspeglar kostnaðin hjá landinum uttan meirvirðisgjald fyri at fólk verða kannað fyri COVID-19. Uppskotið er grundað á øktu útreiðslurnar til COVID-19-kanningar.

Landskassin rindar fyri kanningarnar. Við at áleggja eitt avgjald í sambandi við komu til Føroya er møguligt at dekka nakrar av teimum útreiðslum, sum landskassin hevur av kanningunum, samstundis sum avgjaldið verður álagt har, sum útreiðslurnar serliga eru.

10.000 kanningar um mánaðin kosta landskassanum omanfyri 3 mió. kr. um mánaðin. Við hesum uppskoti fær landskassin inntøkur á 3,12 mió. kr. um mánaðin um 10.000 ferðafólk ferðast til Føroya.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ávísar umsitingarligar avleiðingar fyri TAKS.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur avleiðingar fyri vinnuna serliga við atliti at ferðaseðlum, sum eru seldir, tá uppskotið kemur í gildi.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingarnar á umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri tey ferðandi.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið er ikki í andsøgn við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2.9. Markaforðingar
Talan er í ávísan mun um markaforðingar, eftirsum talan er um broyttar fortreytir og hægri prís fyri ferðaseðil til tey, sum longu hav keypt ferðaseðil, umframt at avgjaldið kann halda øðrum frá at ferðast til Føroyar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, men uppskotið heimilar TAKS at innheinta avgjaldið við panting. Uppskotið ger ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Talan er um eina avgjaldslóg.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki aðrar skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar enn tær, sum nevndar eru omanfyri.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin ella til kommunur, men uppskotið heimilar TAKS at heinta avgjald inn við panting.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Við uppskotinum verður álagt eitt tíðaravmarkað avgjald á ferðandi til Føroya, undir hesum manningar og ferðafólk umborð á útlendskum skipum, sum leggja at í Føroyum, í tann mun manningin fer í land í Føroyum.

Skyldan at rinda avgjald er umframt ferðandi við ferðamannaskipum og flogførum eisini galdandi fyri ferðandi, sum koma til Føroya við stuttleikabátum.

Tá sjúklingar, sum hava verið til viðgerð uttanlands, koma aftur til Føroya, rindar Uttanlandstænastan avgjaldið vegna sjúklingin sum part av viðgerðini.

Børn yngri enn 12 ár eru undantikin frá skylduni at rinda avgjald.

Flutningsfyritøkan ella umboð teirra kunnu krevja ómaksgjald fyri eykakostnað, tá ferðafólk velja ikki at gjalda umvegis talgilda innkrevjingarskipan

Til § 2
Avgjaldið verður kravt inn av flutningsfyritøkunum ella umboðum teirra.

Um ferðaseðilin er seldur, tá hendan løgtingslóg kemur í gildi, setir flutningsfyritøkan ella umboð teirra seg í samband við tann ferðandi til tess tryggja, at avgjaldið verður rindað, áðrenn tann ferðandi kemur til Føroyar.

Flutningsfyritøkan skal í seinasta lagi 10. í øðrum mánaðinum eftir senda TAKS uppgerð yvir innkravt avgjald avvarðandi mánað.

Flutningsfyritøkan avroknar avgjaldið til TAKS. Um flutningsfyritøkan avroknar avgjaldið ov seint, skal renta roknast.

TAKS kann innheinta avgjald og rentu, ið eru fallin til gjaldingar, við panting.

Til § 3
Tað er TAKS, sum krevur avgjaldið inn, tá stuttleikabátar koma til Føroya. Mett verður, at umleið 5 stuttleikabátar koma til Føroya í tíðarskeiðnum, løgtingslógin er í gildi.

Stuttleikabátar hava sambært galdandi reglum fráboðanarskyldu yvirfyri TAKS.

Tað er somuleiðis TAKS, sum krevur avgjaldið inn, tá manning og ferðafólk á útlendskum skipi fer í land í Føroyum.

Avgjald verður ikki álagt manning, sum bert er á keiøkinum.

Til § 4
Uppskotið er tíðaravmarkað og er galdandi í tíðarskeiðnum frá 1. oktober til og við 31. desember 2020.

Fíggjarmálaráðið, 22. september 2020

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Ummælissvar frá SAS
Fylgiskjal 2: Ummælissvar frá Atlantic Airways